## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Summarstevna í Klaksvík



*Meðan tey vaksnu sótu á møti, hugnaðu børnini sær uttanfyri*



*Anne-Lene Olofson er trúboðari í Tanzania, og greiddi frá útbúgvingini av prestum og prestakonum*

**Fyrr í mánaðinum skipaði Kirkjuliga Missiónsfelagið fyri árligu summarstevnu síni.**

TRÚARLÍV
*Snorri Brend*
*Myndir: Bárður*

Aftur hesaferð vóru gestir komnir úr øðrum londum. Í ár vitjaðu hjúnini Anna og Norvald Yri úr Noregi, sum áður hava verið trúboðarar í Tanzania. Norvald var høvuðstalari á stevnuni.

Hinvegin so var eisini ein føroyskur trúboðari við á stevnuni, nevniliga Anne-Lene Olofson, sum, saman við manni sínum Peter O.K., virkar sum trúboðari somuleiðis í Tanzania.

Á stevnuni fingu fólk høvið at hoyra hana greiða frá pørtum av arbeiði sínum, har hon m.a. legði dent á útbúgvingina av prestum og prestakonum.

Flestu møtini vóru hildin í Ósáskúlanum, men summarstevnan endaði sunnukvøldið við felagsmøti saman við KFUM&K í Christianskirkjuni, har Norvald Yri talaði og kórið í KFUM&K sang.



*Tey møta so trúfast upp á hvørjari summarstevnu – at fáa nakrar góðar dagar í andaligum felagsskapi og nakrar dagar saman við øllum hinum*

**Dagurin**

**13. juli. Margreta,** deyð umleið ár 300. Hon var úr Antiokia, og foreldrini vóru heiðin. Hon tók við kristnari trúgv. Av tí at hon ikki vildi lovast heidna herføraranum Olymbrias, varð hon hálshøgd. Ein margretumessa hevur verið hildin. Margreta merkir perla á grikskum máli.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum, sum gleddu meg á 75 ára føðingardegnum 26. juni 2005.
Takk fyri blómur, kort, fjarrit, ymiskar gávur og fyri uppringingar, bæði her á landi og uttanlands frá.
Takk til tykkum, sum stákaðust í køkinum og børn míni, svigarbørn og abbabørn, at tit stuðlaðu so væl og tóku móti gestunum saman við mær.
Eisini leiðslan fyri Lonina, takk at vit kundu fáa høli.
Harrin signi tykkum øll.

**Hjalmar Joensen**
**Fuglafirði**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálptu til, tá okkara elskaði bróður og svágur

**Torfinn Suni Ásmundarson**
Miðvág

andaðist og varð jarðað.

Stóra tøkk fyri peningagávu, kransar og blómur og tøkk til øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Gud vælsigni tykkum øll.

*Familjunnar vegna*

**Birgir, Haldis og Maibritt við familjum**

# Høgni Lisberg í Mentanarhúsinum

**Ungi leirvíkingurin Høgni Lisberg, gevur í næstum sínara næstu fløgu út. Í tí sambandi spælir hann konsert í Mentanarhúsinum fríggjakvøldið 15. juli**

FLØGA
*Niels Uni Dam*

Fyrsta fløgan hjá Høgna »Most Beautiful Things«fekk sera góð ummæli, ikki bara í Føroyum, men uttanlanda við. Serliga gekk Høgni á odda, saman við Plátufelagnum Tutl, fyri Føroysku tónleikabylgjuni í Sveis, har Føroyskur tónleikur nú selur heilt væl. Høgni spældi fleiri konsertir í Sveis, og var sera væl móttikin.

Tað er eingin ivi um, at Høgni veksur við uppgávuni at skriva tónleik, og er hann vorðin betri á palli fyri hvørja konsert. Høgni hevði kanska bestu framførsluna til AME í Norðurlandahúsinum í apríl.

Tí verður tað sera spennandi at síggja, hvat Høgni ferð at borðreiða við á nýggja fløguútgávuni.

Bólkurin hjá Høgna er mannaður av sera dugnaligum tónleikarum: Høgni Lisberg - sang, gittar og slagverk. Jens L. Thomsen - bass, Brandur Jacobsen - trummur, Allan Tausen - gittar, Hans Poulsen - ljómborð

Tað boðar frá høgari góðsku, ið vit fáa høvi at uppliva í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, fríggjakvøldið 15. juli kl. 21.30 .

**Marius eisini við**

Hans Marius Ziska ferð eisini á pallin í Mentanarhúsinum hetta kvøldið, undir navninum »Marius«. Hans Marius var oddamaður í Flux, og er hann nú farin at royna seg við sínum egna bólki. Hans Marius er frámúr góður sangari og sangskrivari. Alt í alt verður tað eitt brak av einari konsert í Mentanarhúsinum hetta fríggjakvøldið í juli.